# Ungur maður druknaði

Um ellivu tíðina sunnumorgunin varð líkið av tí unga manninum, ið hvarv leygarnáttina, funnið. Froskmenn funnu unga mannin á sjónum við keiina á vestaru síðu í Klaksvík.

23 ára gamli maðurin varð eftirlýstur í leygarkvøldið, og í Klaksvík fóru tey at leita á sjógvi og landi, um miðnáttarleitið varð fartelefonin hjá honum funnin á bryggjuni, og tveir froskmenn fóru hóast myrkt var á sjógv at leita. Tó var sýnið so ringt, at einki varð funnið. Leitingin helt fram til kl. fýra sunnunáttina.

Sunnumorgun um hálvgum ellivu tíðina var aftur fari at leita framvið sjóvarmálan, og stutt eftir fóru froskmenn niður. Bert eitt lítið bil gekk, áðrenn líkið varð funnið.

Maðurin var síðst sæddur um fýra tíðina leygarnáttina á vestaru síðu av Klaksvíkini á veg úteftir, tí var alla tíðina leitað í hesum øki. Løgreglan hevur onga ábending um, hvat er hent. Men eins og í restini av landinum var veðrið leygarnáttina sera ringt í Klaksvík.

**nud**

# Stór skriða leyp í Koltri

**Ódnarveðrið síðstu dagarnar hevur havt við sær, at í Koltri leyp stór skriða**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ein stór skriða leyp í Koltri fríggjakvøldið ella møguliga seinni um náttina. Bjørn Patursson, bóndi, sigur, at hann á kvøldi hugsaði mest um vindin, tó at áarførið menti seg upp á fáar tímar. Men vindin metti hann at vera eini 30 til 35 metrar um sek., og harvið eitt tað mesta, ið hann hevur upplivað í Koltri.

### Skelkað

Men tað var áarførið, ið gjørdi um seg, og í dag eru tey skelkaði og rættiliga illa við framvegis, eftir hendingina. Tá tey vaknaðu leygarmorgunin hugdu tey út, og sjónin var skelkandi.

- Talan er um eitt økið, har áir møtast og fara undir jørð og har eru gongdir, ið eru eina manshædd høgar. Men trýstið hevur verið so stórt, at alt er sprongt, sigur Bjørn Patursson, ið meira enn einaferð hevur verið eftir lombum í stóru gongdunum.

Bóndahjúnini í Koltri hava heimasíðu, har tey við myndum og teksti greiða væl frá støðuni. Har stendur m.a. soleiðis 12. november :

”Stórt skriðulop ið byrjaði omanfyri Hamarsgarð mundi undirgrivið kirkjugarðin. Helst hava Koltursmenn í síni tíð hugsa um brimgangin sum til tíðir kann verða ógvusligur tvørtur um oynna tá teir avgjørdu at leggja kirkjugarðin so ovarliga. Men neyvan hugsaðu teir um, at vandin eisini kundi komið úr erva. Og, til alla lukku bleiv skriðan skotin suður um garðin sum, til alla Guðs lukku, bert fekk ”smávegis” skaða á vestaru síðuna.

Beint oman fyri kirkjugarðin er eitt gil har fleiri áirnar úr erva savnast og keldur koma út. Hesar áir hava grivið sær djúpar og stórar tunnlar undir svørinum heilt oman á slætt har tær aftur koma fyri ein dag. Og tað er helst høvuðsorsøkin til at skriðan bleiv so ógvuslig. Tunlarnir hava ikki megnað at svølgt áarførið, ið kom so brádliga úr erva. Trístið frá vatninum hevur sprongt svørin oman av tunlunum sum síðani hevur demmað fyri vatninum og so er´”bólturin farin á rull”.”

### Upprudding

Enn eru tey so skelkaði í Koltri eftir ógvusligu hendingina, at tey ikki eru komin so langt við at hugsa um fylgjurnar ella arbeiðið, sum nú skal gerast. Men bóndin ásannar, at har gerst onki við hond, tí har eru bøkkar komnir oman, ið eru eina manshædd. Men hvønn hann skal venda sær til, veit hann ikki rættiliga enn, og enn eru hugsanirnar heldur ikki rættiliga komnar so langt viðvíkjandi stóra uppruddingararbeiðinum, ið er fyri framman. Til tess er skelkurin ov stórur.

Heimasíðan hjá bóndahjúnunum í Koltri eitur www.koltur.com

# Kann kosta 20 milliónir at lata Smyril sigla ein túr afturat

**Tað kann kosta upp til 20 milliónir um árið at lata Smyril sigla ein túr afturat um dagin ímillum Suðuroy og Havnina, sigur strandferðslan**



*Suðuroyingar mótmæla, at einasta tilknýti við meginøkið, bara verður gjørt upp í pengum, tí tað verða vegir, brýr og tunlar norðanfjørðs ongantíð gjørt*

**SUÐUROYAR-SIGLINGIN**

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skal Smyril sigla ein túr afturat um dagin ímillum Suðuroy og Havnina, kann tað kosta landskassanum upp ímóti 20 milliónum krónum um árið.

Tað vísa útrokningar hjá Strandferðsluni.

Strandferðslan sigur í útrokningum til Løgtingið, at verður túratalið økt upp í tríggjar túrar um dagin, fer tað at kosta 8-11 milliónir meir um árið í olju, alt eftir, hvussu dýr oljan er.

Men fer tímatalið hjá manningini upp um 14 tímar um dagin, verður helst neyðugt at seta eina manning afturat og tað fer at kosta einar 10 milliónir krónur afturat um árið.

Skal Smyril sigla meiri, fer tað eisini at føra til størri slit á skipið, og sostatt verður tað eisini dýrari at røkja og halda. Men, hvussu nógv dýrair tað verður, er vónleyst at siga.

Sostatt kann ein triði túrur um dagin føra við sær eina eyka útreiðslu upp á 20 milliónir krónur um árið, umframt økingar í umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslum.

Hvussu nógv inntøkurnar fara at økjast er hinvegin vónleyst at meta um, men tær verða undir ongum umstøðum nóg mikið til at svara til øktu útreiðslurnar.

– Út frá einum handilsligum sjónarmiði loysir tað seg sostatt ikki at lata Smyril sigla tríggjar túrar um dagin.

Hinvegin vil Strandferðslan ikki meta um samfelagsligu nyttuna av at lata Smyril sigla ein túr afturat.

Á Samferðslufundinum í Vági mánakvøldið, varð funnist at, at siglingin hjá Smyrli varð gjørd upp í krónum og oyrum, tí tað verða vegir, brýr og ferðasamband aðrastaðni í landinum ongantíð gjørt og Smyril er einasta tilknýti hjá Suðuroyingum við meginøkið.

## Tutl fegnast um “Beste world Album”

**Tutl fegnast um at Afenginn fekk “Beste world Album” prísin á Dansih World Awards 2005, tí fløgan Retrograd er nevniliga útgivin á føroyska útgávufelagnum Tutl**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Danish World Awards fór fram 11. november og bólkurin Afenginn fekk heiðurin “Beste world album” fyri fløguna Retrograd.

Hetta fegnast føroyska plátufelagið Tutl um í tíðindaskrivi, tí tað er Tutl, ið hevur staðið fyri at geva fløguna út.

Fløgan er hin fyrsta hjá bólkinum, sum sá dagsins ljós í 2002.

Sagt verður í tíðindaskrivinum frá Tutl, at Afenginn spælir blandaðan tónleik: balkan, norðurlendskt, klezmer og klassiskt og afturat hesum er so eitt vet av sterkum finskum punki.

Bólkurin hevur síðani byrjan spælt eini 150 konsertir á okkara leiðum, men hevur eisini vitjað longur suðuri.

Retrograd, sum Tutl Records gav út, hevur fingið góð orð við á vegnum í donskum miðlum, men eisini øðrum útlendskum miðlum og t.d. valdi týska blaðið Folkworld fløguna millum fimm tær bestu í 2005.

Bólkurin fer í næstum á ferð í Svøríki, Belgia og Sveis og síðsta konsertin á ferðini er á Café Bartof á Frederiksberg tann 9. desember.

## Ræst kjøt, Eyðun og Terji

**Leygarkvøldið 26. november fara Eyðun og Terji á pallin í Århus í sambandi við stóru ræst kjøta veitsluna**

**FØROYINGAFELAG**

Tað er ferð á virkseminum hjá føroyingum uttanlands. Hóast fleiri og fleiri nú velja onnur lond enn ríkisfelagan, Danmark, so skerst tað ikki burtur, at ein øgilig rúgva av føroyingum býr í Danmark.

Í Århus hava tey eitt sjálvboðið føroyingafelag, sum at kalla uttan almennan stuðul skipar fyri ymsum tiltøkum. Størsta tiltakið hjá felagnum er árliga ræst kjøta veitslan. Og hendan verður í ár víðkað til eisini at rúma livandi tónleik. Talan er um rættiligt føroyskt ræst kjøt, og veitslan er tann størsta veitslan fyri føroyingar á Jútlandi, og undanfarin ár hevur gravgangur verið eftir atgongumerkjum.

Umframt ræst kjøta verður eisini møguleiki at vinna flogferðir umframt aðrar góðar vinningar. Limir fáa avsláttur, men øll kunnu stókka inn á gólvið í føroyingafelagnum og keypa sær eitt atgongumerki.

### Eyðun og Terji spæla

Tað verða Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen eisini á pallin at spæla til dans eftir borðhaldið. Báðir hava í nógv ár verið millum best umtóktu føroysku tónleikararnar, og tað fer at neyvan at bila hjá fólki at syngja við. Teir fara at dríva í nógvar av klassikarunum frá solo útgávum og frá Eyðun og Terja útgávunum.

Veitslan verður leygarkvøldið 26. november kl. 19, og atongumerki fáast í hølunum hjá føroyingafelagnum í Århus í Vestergade 48D.

Fleiri upplýsingar fáast á www.aarstova.dk

## G!Music funnið enn ein dómara til GBOB

Tá The Global Battle Of The Bands verður næsta vikuskiftið er ætlanin at í minsta lagi tríggir av teimum fimm dómarunum eru útlendskir. Danin Jeppe Nissen er longu váttaður, og í dag kom ein norrmaður á listan.

Kristoffer Kinden Endresen, er eldhugaður norrmaður miðskeiðis í tjúgunum, sum hóast hann er ungur, hevur hollar royndir innan tónleikaídnaðin.

Kristoffer Kinden Endresen hevur seinastu árini arbeitt kring alt Skandinavia. Millum annað sum fyriskipari á Mejeriet í Lund í Svøríki, sum booking-agentur fyri Gearbox Agency í Danmark og sum agentur fyri norska booking felagið TikTak. Hann hevur arbeitt við at leggja til rættis konsertferðir yvir alt europa og er stjórnarlimur í Network Europe, sum er eitt samtak av europeiskum booking-agentum.

**nud**